# Vit fara ikki at lata Løgtingið trumla okkum niður

**Formaðurin í Starvsmannafelagnum ávarar staðiliga Løgtingið ímóti at leggja seg uppí arbeiðssteðgin hjá Starvsmannafelagnum og tvingar manningina á skipunum hjá Strandferðsluni aftur til arbeiðis**



*Gunnleivur Dalsgarð ávaraði løgtingið staðiliga ímóti at leggja uppí*

ARBEIÐSSTEÐGUR OG SAMFERÐSLA
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Framferðin hjá landsstýrinum ímóti fakfeløgunum er óhugnaligt og heilt óhoyrt.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins, er í øðini inn á landsstýrið tí tað hevur ætlað at leggja uppí arbeiðssteðgin á almenna arbeiðsmarknaðin og at tvinga manningina á strandfaraskipunum aftur til arbeiðis so at skipini sleppa í sigling.

Hann sigur, at tað, sum hendir, kennir ikki sín líka í allari teirri frælsu verðini. Hvat er hent í gamla Sovjettsamveldinum onkuntíð er ikki til at siga, men í fría heiminum er tað ikki komið fyri fyrr, at landsins stýri tekur verkfalsrættin frá einum einstakum bólki í einum felag, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Týskvøldið ávaraði hann somuleiðis staðiliga Løgtingið ímóti taka undir við uppskotinum hjá landsstýrinum um at tvinga fólkið hjá Strandferðsluni aftur til arbeiðis.

Men hendir tað kortini, lovar hann ilt!

– Halda politikarar, at vit fara at sita tigandi og hyggja at, ímeðan løgtingið trumlar okkum niður, skulu teir trúgva umaftur, tí hetta fara vit als ikki at góðtaka.

Hann sigur, at arbeiðssteðgurin hevur bara vart eina lítla viku enn, men metir landsstýrið, at samfelagslig virði eru í vanda er bara eitt at gera og tað er at koma aftur til samráðingarborðið.

– Men at landstýrið, við gamla arbeiðaraflokkinum, javnaðarflokkinum, á odda, ístaðin brúkar Løgtingið at knúsa fakfeløgini, er beinleiðis skelkandi.

Her er talan um eitt vanligt sáttmálaloysi og tað er ikki vanligt, at ymisk øki í landinum verða rakt, tá ið arbeiðssteðgir eru.

Gunnleivur Dalsgarð vil ikki siga nakað um, antin fakfeløgini fara at seta tiltøk í verk.

Men hann sigur, at her er talan um ágang út um alt mark og at Starvsmannafelagið hevur verið í sambandi við onnur fakfeløg, tí hetta er ein støða, sum feløgini ikki kunnu góðtaka undir nøkrum umstøðum.

– Og hvat fer at henda, er ikki til at siga nú, men hetta er ikki ein støða, sum vit fara at góðtaka.

– Vit góðtaka ikki, at landsstýrið einaferð enn brúkar lóggávuvaldið til at knúsa fakfeløgini, tað skulu politikararnir verða púra vísir í, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Frekt av landsstýrinum at vænta samstarv um skipini hjá Strandferðsluni

**Leggur Løgtingið uppí arbeiðssteðgin hjá Starvsmannafelagnum, fer tað at skaða royndirnar at fáa eina varandi loysn á tí trupulleika, at strandfaraskipini verða so ofta rakt av arbeiðsósemjum**



*Smyril er eitt av skipunum, sum oftani liggur, tá ið arbeiðssteðgur er. Landsstýrið ætlar at fáa eina varandi loysn, so at Strandfaraskipini verða frítikin fyri arbeiðsósemjur, men tann ætlanin hevur kanska longu í føðingini fingið eitt álvarsligt skot fyri bógvin*

ARBEIÐSSTEÐGIR OG SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er meiri enn frekt av landsstýrinum at vænta sær nakað samstarv við fakfeløgini um skipini hjá Strandferðsluni aftaná hetta her.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum sigur, at leggur løgtingið uppí arbeiðssteðgin hjá Starvsmannafelagnum, fer tað at skaða fyri royndirnar hjá landsstýrinum at finna eina varandi loysn á tí trupulleika, at skipini hjá Strandferðsluni so ofta verða rakt av arbeiðssteðgi.

Landsstýrið hevur boðað frá, at tá ið hesin arbeiðssteðgurin er av, og viðurskiftini fingin í rættlag aftur, fer landsstýrið at royna at fáa eina varandi loysn á hesum trupulleikanum at skipini hjá strandferðsluni verða løgd so ofta, tá ið arbeiðssteðgur er.

Men Gunnleivur Dalsgarð heldur, at eftir tað sum nú hendir, verður tað ógvuliga trupult hjá landsstýrinum at fáa nakað samstarv ið fakfeløgini um hesi viðurskifti.

– Eg veit ikki hvat bagir politikarum, um teir fyrigykla sær at teir skulu fáa eitt samstarv við fakfeløgini um Strandferðsluna aftaná at tað, sum hendir nú, har teir leggja seg út í ein fult lógligan arbeiðssteðg og taka broddin av arbeiðssteðginum við at tvinga maningina á strandfaraskipunum aftur til arbeiðis, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Kunnu bara gera semingsuppskotið til lóg



*– Ellintur Abrahamsen sigur, at Fíggjarmálaráð ið hevur alla skyldina av støðuni og tí kann Løgtingið onki gera uttan at gera semingsuppskotið til lógum so er at partarnir ikki hava funnið semju áðrenn*

**Leggur Løgtingið uppí arbeiðsósemjuna, kunnu teir bara gera eitt og tað er at gera semingsuppskotið til lóg, sigur formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum**

ARBEIÐSÓSEMJA OG SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi altíð verið ímóti, at løgtingið leggur seg út í ósemjur á arbeiðsmarknaðinum. Men hesuferð haldi eg, at løgtingið skuldi lagt uppí-og gjørt semingsuppskotið til lóg.

Ellintur Abrahamsen er formaður í Skipara- og navigatørfelagnum og hann heldur, at kunnu partarnir ikki semjast og Løgtingið leggur upp í, kann tað bara gera eitt og tað er at gera semingsuppskotið til lóg.

– Tað er bara ein máti at sleppa undan eini kreppu og tað er at, landsstýrið tekur undir við semingsuppskotinum, ella at løgtingið leggur uppí og ger semingsuppskotið til lógella at onnur semja verður funnin

Ellintur Abrahamsen leggur dent á, at Starvsmannafelagið hevur altso góðtikið semingsuppskotið, men at tað er fíggjarmálaráðið, sum hevur vrakað tað.

– Tað er allur munurin. Tað er Fíggjarmálaráðið sum gjørdi eitt stórt mistak við at vraka semingsuppskotið og tí er onki at gera,uttan at seta tað í gildið.

Semingsuppskotið gav Starvsmannafelagnum eina lønarhækking upp á 1% í eitt ár.

– Landsstýrið heldur, at tað er ov nógv. Kanska vildi landsstýrið heldur havt, at lønarhækkingin var 0,8%, tí so svaraði hon til tað, sum arbeiðarafeløgini fingu tað fyrsta árið.

– Sostatt er tað 0,2%, sum skilir partarnar. Hinvegin fingu arbeiðarafelagið 0,8% í mai mánaða, men Starvsmannafelagið skuldi fáa 1% frá oktober. Og verður alt talt saman og rokna um, man ómetaliga lítil munur verða á.

– Men so hevur landsstýrið gloymt at rokna við allari inntøkuni, sum verkafólk kring landið hava mist, serliga á fiskavirkjum, tí virkini í útjaðaranum fáa ikki keypt fisk. Og tað svarar til nógv meiri enn 0,2%, sigur Ellintur Abrahamsen.

– Og tað hevur Fíggjarmálaráðið alla skyldina av, leggur hann afturat.

Annars hevur ljóðað, at legði tingið uppí so fara Skipara-og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið at leggja arbeiðið niður í 24 tímar?

Ellintur Abrahamsen vil bara svara fyri navigatørarnar og har hevði tann spurningurin ikki verið umrøddur. Annars heldur hann ikki, at tað gevur nakra mening.